# – Avleiðingar útvatnaðar í føroyskum politikki

**__ Tað er fullkomiliga avgerandi, at vit í Tjóðveldisflokkinum ikki býta okkum upp eftir religiøsum sjónarmiðum, sigur Høgni Hoydal, ið heitir á sínar floksfelagar um at fylgja sínum samfelagsligu sjónarmiðum, tí tey átrúnaðarligu sjónarmiðini hoyra til privatlívið, nú ikki øll siga vera nøgd við støðuna í flokkinum. Høgni Hoydal fylist eisini á, hvussu samgongan hevur viðgjørt málið um Alfred Olsen**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*

- Tað er harmiligt. Men eg sigi, sum tá Karsten fór, at eg virði avgerðirnar, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, nú Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sigur seg harmast um flokkin eftir atkvøðugreiðsluna um 266b í revsilógini.

- Tað er fullkomiliga avgerandi, at vit í Tjóðveldisflokkinum ikki býta okkum upp eftir religiøsum sjónarmiðum, sigur Høgni Hoydal, ið heitir á sínar floksfelagar um at fylgja sínum samfelagsligu sjónarmiðum, tí tey átrúnaðarligu sjónarmiðini hoyra til privatlívið.

- Annars gera vit okkum inn á trúarfrælsið og fólkaræðið, heldur floksformaðurin.

- Vit skulu skipa samfelagið eftir samfelagsligum og hugsjónarligum sjónarmiðum, ikki átrúnaðarligum, sum eru uttan fyri fólkaræðið, tí so fer fólkaræðið ikki at virka.

Høgni Hoydal ger vart við, at dyrnar enn eru opnar fyri Karsten Hansen, og at tey hava heitt á hann um at leggja sína orku aftur í politikk.

*Hava tit hoyrt nakað aftur frá Karsten Hansen?*

- Tað havi eg onga viðmerking til, sigur Høgni Hoydal.

### Ikki býta tjóðina sundur

Spurdur, um neyðugt er hjá føroysku flokkunum at melda út, hvar teir standa á eini moralskari ás eins og á tí ríkisrættarligu, sigur Høgni Hoydal, at hetta er eitt mál sum hevur stóran týdning.

Høgni Hoydal metir, at eitt mál av sonevndum etiskum slagi skjótt kann verða misskilt. Men hann ávarar um at býta flokkarnar upp í religiøsar og verðsligar flokkarm, sum hann heldur, Miðflokkurin ger.

- Tað er ein feilur sum Miðflokkurin ger, at býta tjóðina sundur, sigur Høgni Hoydal.

- Vit býta okkum ikki eftir átrúnaðarligari sannføring, men vit hava rætt til trúarfrælsi.

Ein av avleiðingunum eftir málið 266b er m.a., at Alfred Olsen tók seg úr samgonguni. Tó eru ikki øll samd um, um hetta er tað sama sum at melda seg inn í andstøðuna.

- Alfred hevur einki samskifti havt við okkum yvirhøvur.

- Alt sum eitur avleiðing er nú útvatnað í føroyskum politikki, nú hvør tingmaður ger, sum hann hevur hug og kann merkara seg, sum hann vil, sigur Høgni Hoydal.

Tjóðveldisformaðurin heitir á leiðaran í føroyskum politikki, sum hann kallar løgmann, um at seta skilmark, tí alt annað er hykleriskt sambært Høgna Hoydal.

- Hetta er tekin um ráðaloysi, sigur Høgni Hoydal um støðuna, tá formaðurin í rættarnevndini tekur seg úr samgonguni, og tað verður meira týdningarmikið at varðveita persónlig privilegiir, sum Høgni Hoydal tekur til.

### Skipað andsøgn

- Her er talan um skipaðan ruðuleika, sum er ein andsøgn í sær sjálvum. Hetta er andsøgn sett í system, sigur Høgni Hoydal um støðuna hjá Alfred Olsen, sum hevur tikið seg úr eini samgongu, hann kortini hevur lovað at atkvøða við, og samanber hetta við greiðum tilsipingum hjá ávísum sambandsmonnum, ið hava sagt seg vera ímóti deyðarevsing men fyri at drepa Saddam Hussein.

- Hetta svarar til, at Anfinn Kallsberg tók seg úr samgonguni, men varðveitti formannssessin í fíggjarnevndini.

Høgni Hoydal metir, at grundleggjandi orsøkin til støðuna eftir 266b er tannvit sum heimastýri ongantíð hava viðgjørt út í odd og egg, hvat okkara fólkaræði skal byggja á.

Spurdur um hann sum bæði løgtingsmaður og fólkatingsmaður merkir mun í arbeiðnum í hesum báðum parlamentum, svarar hann, at danir hava verið noyddir at viðgjørt slík viðurskifti, eins føroyingar ikki eru í støðugum samskifti við onnur, eins og danir eru.

- Danskur politikkur kann vera undarlig støðd, men tey hava ábyrgd fyri at skapa eitt rættarsamfelag, men vit hava ikki ábyrgd av tí, sigur Høgni Hoydal.

## Steinbjørn ikki broytt støðu um at broyta støðu

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
theodor@sosialurin.fo

Seinasta vikuskiftið segði Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, at hann umhugsaði støðuna í Tjóðveldisflokkinum eftir atkvøðugreiðsluna um §266b í revsilógini.

- Eg umhugsi alvorliga støðuna, tí eg eri ikki nøgdur við hana, sum hon er nú. Eg havi ikki tikið støðu enn, men tað verður um ikki so langa tíð, var svarið hjá borgarstjóranum.

Tað tykist kortini ikki, sum tjóðveldisfólk skulu óttast at missa borgarstjóran í Føroya næststørsta býi fyribils.

Í stuttum við tali sigur Steinbjørn O. Jacobsen, at einki nýtt er í málinum, men at hann kortini enn hugsar seg um.

- Tað er einki broytt. Men tit skulu nokk hoyra frá mær, um okkurt er. Men eg havi úr at gera, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.


www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um **1. februar**, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seinsta freist at søkja starvið er **22. januar 2007**, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Tín høvuðsuppgáva verður dagliga framleiðslan av blaðnum, í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er **20. januar**, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*